Undirskrift formansins:_____

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	27.04.2023 kl. 17:30
Málnr.:	21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir:	Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:	
Ikki møtt:	
Onnur:	Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
34/23	22/00206-4	Avtala um atløgubryggju í Árnafirði
35/23	22/00531-30	Grundøkini undir Hamri - regulering í søluprísi
36/23	23/00303-1	Víðkað umsitingarlig heimild í samband við endurgjald fyri snøklar
37/23	23/00336-10	Umvæling av býráðshúsinum
38/23	23/00468-3	Nýggj farleið til Svínoyar - uppskot
39/23	21/01377-20	Tilmæli um endurnýggja tilsøgn av íløgustuðul til Húsarhaldsskúla Føroya.
40/23	23/00559-1	Tilmæli um eykajáttan og útvegan gjaldføri til byggiverkætlanir – *Fyrra viðgerð*
41/23	23/00357-1	Eykajáttan 2023, mars og apríl – *Seinna viðgerð*
Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum		
42/23	21/01331-56	Vinnuútstykkingin undir Hamri, *seinna viðgerð*

Til viðgerðar

34/23
22/00206-4 Avtala um atløgubryggju í Árnafirði.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	19.04.2023	19/23
2 Fíggjarnevndin	24.04.2023	33/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	34/23

22/00206-4 Avtala um atløgubryggju í Árnafirði.

Frágreiðing um málið:
Vísandi til mál nr. 21/00742-3 Atløgubryggja í Árnafirði, í samband við tunnilsarbeiði – Articon, so hevur fundur verið millum Klaksvíkar kommunu og Articon um málið.
Á fundinum bleiv avtalað av Klaksvíkar kommuna kann gjalda atløgubruggjuna í Árnafirði í 2024 ístaðinfyri í 2023, sum uppruna varð avtala.

Articon hevur sent Klaksvíkar kommuna uppskot til gjaldsavtalu, sí skjal nr. 22/00206-02 í málinum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin og fíggjarætlaini 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Um fyriliggjandi avtala verður undirskriva, viðførur tað at klaksvíkar kommuna skal seta 4,5 mió kr. á fíggjarætlanina 2024 til endamálið.

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri avvarandi nevndir til viðgerðar.

Havna- og Vinnunevndin 19. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-04-2023

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Atli S. Justinussen luttók ikki á fundinum av málinum vegna ógegni.
Ein minniluti KHJ og OáL tekur undir við HaVN, dagf. 19-04-2023.
Ein minniluti JS og TJL tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá KHJ og OáL í FíN 24-04-2023; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML og TJL) og ongari atkvøðu ímóti; SVJ og JS atkvøddu ikki.

35/23
22/00531-30 Grundøkini undir Hamri - regulering í søluprísi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	24.04.2023	34/23
2 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	35/23

22/00531-30 Grundøkini undir Hamri - regulering í søluprísi

Frágreiðing um málið:
Í útstykkingini undir Hamri liggur vestara marki á grundøkjunum: matr.nr. 1650ap, 1646d, 1646e, 1647f, 1646g og 1646h heilt inn móti beninum. Hetta ger, at veitin, sum skal lofta vatninum omanúr fjallinum, liggur inni á teimum einstøku matrikulunum.

Í ognarbrævinum er tí innbygdur servittur, um at ikki kann byggjast nærri vesturmarkinum enn 5 metrar, og veitin altíð skal vera atkomulig hjá kommununi at reinsa.

Sum svar uppá innkalling til undirskriving av ognarbrøvunum gera keypararnir nú vart við, at teir meta seg ikki eiga at rinda fyri "veitina", sum teir í grundini als ikki kunnu brúka til nakað.

Blá linja 3,5 metrar frá vesturmarki – kommunan fullan ræðisrætt
Gul linja 5 metrar frá vesturmarki – byggilinja vestureftir

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Inntøkan av sølu fyri omanfyri nevndu grundøkir minkar við kr. 573.300,- (úr kr. 5.612.600 til kr. 5.039.300,-)

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting og Vinnufyrisitingin eru samd í útmeldingini hjá keyparunum og skjýtur upp, at ein geiri uppá 3,5 metrar framvið øllum vesturmarkinum verður frítikin fyri gjald, samstundis sum servituttur verður lisin á hvønn einstakan matrikul um, at kommunan hevur fullan ræðisrætt á nevnda 3,5 metra breiða geiranum.

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-04-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Tilmælið frá FíN 24-04-2023 einmælt samtykt.

36/23
23/00303-1 Víðkað umsitingarlig heimild í samband við endurgjald fyri snøklar

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.04.2023	43/23
2 Tekniska Nevnd	19.04.2023	27/23
3 Fíggjarnevndin	24.04.2023	37/23
4 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	36/23

23/00303-1 Uppskot til víðkaða umsitingarliga heimild í samband við endurgjald fyri "alment nýttir privatir snøklar"

Frágreiðing um málið:
Sum kunnugt keypir og selur Klaksvíkar Kommuna snøklar fyri kr. 110,-/m^2.

Hóast umsitingin er vitandi um, at privatar ognir nógva staðni í kommununi eiga út í veg- og/ella gongubreytarøkið, hevur fokus ikki verið á at fáa uppkeypt øll hesi lendi, men heldur eru málini tikin upp, so hvørt kommunan er komin framvið í samband við liðugtgerð av vegi, vegbreiðkan ella líknandi.

Í samráðingum við einstaka eigaran er oftast mótvilji móti at selja fyri kr. 110,-/m^2, - hetta grundað á, at kommunan(almenningurin) longu hevur brúkt økið í áravís uttan at rinda nakað fyri tað.

Tekniska Fyrisiting er samd við eigarunum av alment nýttum privatum snøklum, at hesi áttu at fingið eitt størri endurgjald enn fyri økir, sum eigaranin hevur havt fult gagn av líka til søludagin.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Endurgjaldið fyri "alment nýttir privatir snøklar" verður nakað hægri enn higartil galdandi – alt eftir stødd av lendi og semju um áramálsnýtslu. Har tað er møguligt verður keypið fíggjað av aktuellu verkætlanini.

Tilmæli:
Skotið verður upp, at fyrisitingin fær heimild til at bjóða eigaranum av alment nýttum, privatum snøklum, kr. 110,-m^2 fyri lendið + galdandi leiguprís fyri grúslendi fyri tað tíðarskeið, partarnir kunnu semjast um, lendið hevur verið brúkt av almenninginum – tó ikki meir enn 20 ár. (leiguprísur fyri grúslendi er í dag kr. 18,50/m2).

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-04-2023

Tekniska Nevnd 19. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-04-2023

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við TN, dagf. 19-04-2023.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Tilmælið frá FíN 24-04-2023 einmælt samtykt.

37/23
23/00336-10 Umvæling av býráðshúsinum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.04.2023	45/23
2 Fíggjarnevndin	24.04.2023	38/23
3 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	37/23

23/00336-10 Umvæling av býráðshúsinum

Frágreiðing um málið:
Vísandi til býráðssamtyktin 23 mars 2023, ið heimildar umsitingini at innheinta fullfíggjaða kostnaðarmeting fyri tekju og skjøldur og einari arbeiðs- og fíggjarætlan yvir ár (2026) frá ráðgevanum í samband við umvæling av býráðsshúsinum.

Vinaliga sí *BÝRÁÐSHÚSIÐ_skitsuuppskot_10.apríl2023* har uppskotið er lýst við myndum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:

2 mio. kr. eru settar av íløgum fastogn 2023.
131.250 tkr. eru nýttur av teimum 2 mió. kr. til arkitekta ráðgeving.

Tekja og suður skjøldur eru mett til uml. kr. 3.5 mió. kr.,-
Øll verkætlanin yvir ár: Uml. 6,7. mio. kr til dagføring av øllum klimaskermi og tekju.

Ráðgevin ger vart við at tað ber til at laga íløguætlanina til.
Millum annað ber til at taka byggistig 1 (#1) yvir tvey fíggjarár ávikavist 2023 og 2024 og skjóta hini stigini 1 ár til ávikavist 2025 og 2026.
Í tí sambandi kundi tekjan verið gjørd í summar 2023 og suðurskjøldurin (gjørdur) avroknaður í 2024.

Vinaliga sí *BÝRÁÐSHÚSIÐ_útsíðudagføring_KOSTNAÐARYVIRSLAG_11.04.2023.*

Tilmæli:
Mælt verður til at fremja arbeiðstøkuna fyri tekjuna innanfyri játtanina á 2 mió. kr í 2023. Dagføringin av suðurskjøldrinum má bíða til komandi ár.
Mælt verður til at raðfesta játtan til umvælingararbeið fyri komandi fíggjarár 2024.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-04-2023.

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 17-04-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Tilmælið frá FíN 24-04-2023 einmælt samtykt.

38/23
23/00468-3 Nýggj farleið til Svínoyar - uppskot

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.04.2023	47/23
2 Havna- og Vinnunevndin	19.04.2023	22/23
3 Tekniska Nevnd	19.04.2023	29/23
4 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	38/23

23/00468-3 Nýggj farleið til Svínoyar - uppskot

Frágreiðing um málið:
Tann 31. januar 2023 viðgjørdi Svínoyarnevndin eitt uppskot frá limi í nevndini, um at taka málið uppaftur, at gera tunnil yvir til Havnar á Svínoynni, og at gera nýggja havn á staðnum.

Mynd:

Uppskotið frá staðbundna liminum er soljóðandi:
Tað er eingin ivi um at ábøturnar ið gjørdar eru á lendingarnar í Svínoy seinastu 2-3 árini hava bøtt munandi um umstøðurnar, men hetta er tó ikki nøktandi. Orðsøkirnar eru fleiri, men trygdin er tann mest týdningarmesta. Tað er ikki trygt at ferðast til og frá Svínoy, soleiðis sum umstøðurnar eru í dag. Eitt skip sum ikki er bundi, men fer aftur og fram við kajina, alt meðan ein skal passa sær løgir á leypa, hoyrir ikki

nútíðini til. Nevndarlimurin vísir á, at ein tunnil í Svínoy eigur at verða næsta uppgávan hjá boritoyminum hjá LV. Til seinast verður nevnt, at nú er eitt størri støðugt arbeiðspláss í bygdina, sum eisini hevur tørv á betur tænastu á samferðslusíðuni. Tó er tann stórsta orsøkin til nýggju farleiðina trygdin hjá øllum ferðandi.

Tann 31.01.2023 tók staðbundna nevndin undir við málinum, og mælti til, at ein áheitan verður send til Føroya Løgting.

Umsitingarligar viðmerkingar:
Landsverk hevur í nøkrum umførum arbeitt aktivt við uppskotum um nýggja farleið til Svínoyar, og skulu við nevna trýggjar her:

- Nýggj ferjulega við brimgørðum á Eiðinum – ivasom verkætlan, sum er trupult og kostnaðarmikið at fremja.
- Nýggj ferjulega yvuri í Havn – verkætlan sum gevur gott reglusemi, og sum eisini er løtt at fremja, tá atknýttir vegir og tunnil er gjørdur til plássið.
- Rennistrong til Svínoyar, og víðari til Fugloyar – spennandi verkætlan, sum tó krevur, at tað framvegis er sjósamband til Svínoyar (og Fugloyar).

Vit nevna ikki undirsjóvartunnil til Svínoyar her, hóast hetta eisini er eitt uppskot, sum Landsverk hevur hugt eftir.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin. Talan er um alment mál.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið hevur ongar avleiðingar fyri fíggjarætlan kommununnar.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan, um tikið verður undir við viðtøkuni hjá Svínoyarnevndini.
Um tikið verður undir við Svínoyarnevndini, verður nevnda skriv sent.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:
Nevndin tekur undir viðtøkuni hjá Svínoyarnevndini um at senda skriv.

Havna- og Vinnunevndin 19. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 17-04-2023

Tekniska Nevnd 19. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN, dagf. 19-04-2023

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Tilmælið frá TN 19-04-2023 einmælt samtykt, og at borgarstjórin og umsitingin fáa í lag fund við Landsverk um framtíðar samband til Svínoyar.

39/23
21/01377-20 Tilmæli um endurnýggja tilsøgn av íløgustuðul til Húsarhaldsskúla Føroya.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	24.04.2023	32/23
2 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	39/23

21/01377-20 Tilmæli um endurnýggja tilsøgn av íløgustuðul til Húsarhaldsskúla Føroya.

Frágreiðing um málið:
Tilsøgn um stuðul til bygging av nýggjum húsarhaldsskúla er gingin út (sí fylgiskjal). Tí er neyðugt at taka støðu til, um tilsøgnin um byggistuðul skal endurnýggjast.

Í samband við, at temafundur var tann 17.11.2022, varð samtykt at útseta gjaldið av íløgustuðuli til Húsarhaldsskúla Føroya fyri árið 2023.
Í samráð við stjóran fyri Húsarhaldsskúla Føroya, Jóhannu á Tjaldrafløttu og byggiráðgeva Jón Sólsker, var farið undir at kanna, um aðrir partar í verkætlanini vóru sinnaðir at rinda sín lutfalsliga part fyrr enn upprunaliga ætlað í verkætlanini. Eftir nakað av samskifti var greitt, at Bústaður vóru ikki áhugaðir at rinda fyrr enn ætlað.
Byggiráðgevi, Jón Sólsker, bað síðani um fund við BUMR (Barna- og útbúgvingarmálaráðið), har umboð fyri Klaksvíkar kommunu og Húsarhaldsskúla Føroya, luttóku á fundi tann 14. marts 2023.

Á fundinum greiddi Jón Sólsker frá støðuni, og legði fram uppskot um at gera at gera tillagingar í gjaldsavtaluni innan fyri verandi játtanarkarm landsins. BUMR hevur síðani sent Klaksvíkar kommunu eina niðurstøðu í málinum, har BUMR siga seg ikki hava heimild at rinda fyrr enn ætlað. Víst verður til, at teir meta, at ein tillaging av gjaldsavtaluni er at kalla eitt útlegg fyri Klaksvíkar kommunu.
Klaksvíkar kommuna og Húsarhaldsskúla Føroya eru ósamd í hesum, og hava 28. mars biðið um eina nágreining av niðurstøðuni, og mæla til at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð. Klaksvíkar kommuna hevur ikki frætt nakað aftur frá BUMR, men sannlíkt er, at ongin nýggj niðurstøða verður í hesum máli.

Við støði í sýtanarskrivum frá bæði Bústaðum og BUMR, er neyðugt, at Klaksvíkar kommuna fíggjar íløgustuðulin við lántøku fyri at rinda sambært dagførdu gjaldsætlanini.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, løgtingslóg nr.87 frá 17. mai § 43.

Fíggjarligar avleiðingar:
Klaksvíkar kommuna hevur bundið seg til rinda 21 mió kr. til verkætlanina, av hesum hevur klaksvíkar kommuna pr. 30.09.2022 goldið 1.831,250 kr.
Sambært gjaldsætlanini, skal klaksvíkar kommuna gjalda 9 mió kr. í 2023 og 10 mió kr. í 2024.

Tilmæli:
Mælt verður til at endurnýggja tilsøgnina um stuðul til Húsarhaldsskúla Føroya, har Klaksvíkar kommuna játtar at rinda fyri íløgustuðul til Húsarhaldsskúla Føroya í 2023 til og við væntandi 2025.

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 24-04-2023.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Tilmælið frá FíN 24-04-2023 einmælt samtykt.

40/23
23/00559-1 Tilmæli um eykajáttan og útvegan gjaldføri til byggiverkætlanir – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	24.04.2023	31/23
2 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	40/23
3 Klaksvíkar Býráð	25.05.2023	

23/00559-1 Tilmæli um eykajáttan og útvegan gjaldføri til byggiverkætlanir

Frágreiðing um málið:
Tilmæli um eykajáttan og útvegan av gjaldføri til byggiverkætlanir

Borgarstjórin hevur heitt á umsitingina at kanna møguleikarnar at fáa fígging til verkætlanirnar "Føroya Húsarhaldsskúla" og "lendisarbeiði í miðbýnum", har nýggja hotellið skal byggjast.

Kommunan hevur sum kunnugt bundið seg at gjalda 21 mió. kr. til bygging av nýggja Húsarhaldsskúlanum. Kommunan hevur áður goldið uml. 2 mió. kr. til Húsarhaldsskúlan ísbv projekteringina, so eftir eru at gjalda 19 mió. kr.

Arbeiðið í miðbýnum er mett at kosta ca. 21 mió. kr. (við mvg).

	Gjaldsætlan (mett)			
Mettar útreiðslur (kr. 1.000)	**2023**	**2024**	**2025**	**Ialt**
Húsarhaldsskúlin	9.000	10.000		19.000
Miðbýur - liðugtgerð ísbv hotell bygging	6.000	11.000	4.000	21.000
	15.000	21.000	4.000	40.000

Sambært seinastu gjaldsætlanunum frá ráðgevunum skulu 15 mió. kr. rindast í 2023 og í 2024 og 2025 ávikavist 21 mió. kr. og 4 mió. kr.

Við at rinda 15 mió. kr. í 2023 verður tilsvarandi minni at gjalda í 2024 og 2025.

Mælt verður til, at henda eykajáttan í 2023 (15 mió. kr.) verður fíggjað við lántøku, sum fevnir um bæði bygging av húsarhaldsskúla (9 mió. kr.) og lendisarbeiði í samband við hotellbygging (6 mió. kr.). Fyrisitingin mælir til, at lendisarbeiðið í samband við hotellið verður rindað til hotelfelagið heldur enn at gera eina afturgjaldsavtalu. Sáttmáli verður gjørdur í næstum við hotellfelagið um lendisarbeiðið, har meginreglan er, at rindað verður fyri framt arbeiði. Hetta er ein betri samráðingarstøða enn leisturin við afturgjaldsavtalu.

Klaksvíkar býráð játtaði í 2019 21 mió. kr. til bygging av húsarhaldsskúla. Neyðugt er, at Klaksvíkar kommuna rindar sín lutfalspart í ár (sí mál 21/01377-20).

Upphæddirnar í 2024 og 2025 verða at seta av í fíggjarætlanunum 2024 og 2025.

Sum kunnugt er nettoskuldin í dag oman fyri loyvda skuldarmarkið, og tí skal landsstýrið góðkenna hesa lántøku.

Lógargrundarlag:
Kommunulógin § 43.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarætlanin 2023 javnvigar við 78 tkr. og við eykajáttanini fer fíggjarætlanin at vísa 15 mió. kr. í halli.

Hetta kemur afturat eykajáttanum, sum vórðu samtyktar í mars (9,8 mió. kr.), og eru hesar fíggjaðar við láninum, sum bleiv upptikið í januar (40 mió. kr.).

Tilmæli:
Mælt verður fíggjarnevndini til at taka undir við tilmælinum um, at fyrisitingin arbeiðir víðari við at útvega gjaldføri til at rinda partin hjá Klaksvíkar kommunu til bygging av húsarhaldsskúlanum á 9 mió. kr í 2023 og 6 mió. kr til lendisarbeiði í samband við bygging av nýggjum hotelli í miðbýnum. Biðið verður um undirtøku fyri at biðja peningarstovnar um tilboð upp á 15 mió. kr. til hesar báðar verkætlanirnar.

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:
Nevndin er samd um, ikki at taka eitt lán, men at brúka peningin frá søluni av lendi til verkætlanirnar og annars finna rest fíggingina innan verandi fíggjarætlan.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Atkvøtt varð um soljóðandi tilmæli frá Karl Johansen, borgarstjóra: "*Vísandi til fíggjarnevndarsamtykt, dagfest 24. apríl 2023, verður mælt býráðnum til at samtykkja at veita eykajáttan á tilsamans 15 mió. kr. til partin hjá Klaksvíkar kommunu til bygging av nýggjum húsarhaldsskúla og til lendisarbeiði í samband við hotellbygging í miðbýnum. Eykajáttanin verður fíggjað við sølu av lendi og tøkum peningi*"; tað varð einmælt samtykt.

41/23
23/00357-1 Eykajáttan 2023, mars og apríl – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Heilsunevndin	13.03.2023	10/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.03.2023	35/23
3 Mentanarnevndin	14.03.2023	21/23
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.03.2023	10/23
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	14.03.2023	7/23
6 Havna- og Vinnunevndin	15.03.2023	17/23
7 Tekniska Nevnd	15.03.2023	22/23
8 Fíggjarnevndin	21.03.2023	22/23
9 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	31/23
10 Klaksvíkar Býráð	27.04.2023	41/23

23/00357-1 Eykajáttan 2023 – mars og apríl

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 23. mars 2023.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlaða upphæddin í hesum eykajáttanaryvirlitinum er 28,6 mió. kr.
Um kommunan samtykkir eykajáttanir uttan meirinntøkur/sparingar/umraðfestingar, verður torførari at røkka málinum at koma undir skuldarmarkið í 2024. Tað er týdningarmikið at hava í huga fíggjarligu avleiðingarnar fyri 2024 og 2025.

Tilmæli:
Við hesum verða eykajáttanirnar lagdar fyri avvarðandi nevndir til viðgerðar og støðutakan, og samlaðu eykjáttanirnar verða lagdar fyri fíggjarnevnd og býráð til viðgerðar og støðutakan.

Heilsunevndin 13. mars 2023:
Málið hevur verið til kunningar, dagfest 13-03-2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. mars 2023:
Ein meirluti GvK, OáL ASB og SVJ, vísir til avseting á 10 mió.kr. og inntøku á 12 mió.kr. og tekur írestandi 4 mió.kr. til viðgerð seinni í ár.
Ein minniluti, JS tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Mentanarnevndin 14. mars 2023:
Ein minniluti JC og GvK tekur undir við at framflyta játtaninar til Hitavekslari kr. 630 t. Hornaskýlið kr. 2,1 mió. Dipparaneystið kr. 400 t. Rennibreytin kr. 0.
Ein minniluti ÓML og SVJ taka støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. mars 2023:
Ein minniluti, EYÓP og JCC, tekur undir við at kr. 400.000 verða fluttar fram til uttanumøkið til dagstovnin Fjallafípuna.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 14. mars 2023:
Ein minniluti, GVK og JCC, taka undir við at framflyta kr. 1.200.000 til tænastudepilin á Viðareiði, kr. 500.000 til dagføring av Sambýlinum á Heygnum og kr. 0 til ognan av lendi til eldradepil í Klaksvík.
Ein minniluti, SVJ og ÓML, taka støðu í býráðnum.

Havna- og Vinnunevndin 15. mars 2023:
Ein meirluti ASJ, EyÓP, og OáL tekur undir við at 3,4 mió.kr. verða fluttar fram undir Grein 7.
Ein minniluti ÓML og TL tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Tekniska Nevnd 15. mars 2023:
Ein meirluti OáL, EyÓP, ASJ tekur undir við at framfyta játtanir Smiðjan/sveisirúm tkr. 550 og vegur/íløgur tkr. 500.
Ein minniluti ÓML og TL tekur støðu tá samlaða heildaryvirlitið er tøkt.

Fíggjarnevndin 21. mars 2023:
Ein meirluti KHJ, ASJ, OáL tekur undir við yvirlitinum yvir eykajáttanum mars 2023, kr. 9.680.000,00.
Ein minniluti JS og SVJ tekur undir við yvirlitinum yvir eykajáttanum mars 2023, treytað av at avsetingin til Gloria verður hækkað við kr. 200.000,00.

Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023:
Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 21-03-2023; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TÓS) og 5 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, OáL, EÓP og JCC); GvK og ÓML atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 21-03-2023; tað varð einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 27. apríl 2023:
Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Atkvøtt varð tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 23. mars 2023; tað varð einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

42/23
21/01331-56 Vinnuútstykkingin undir Hamri, *seinna viðgerð*

Fundurin lokin kl. 19:00